# Færri enn 5000 fólk í Suðuroy

Felagsheimasíðan hjá suðuroyingum, www.sudurras.com , sigur í dag, at ikki síðan fyrru helvt av 1920-unum hevur fólkatalið í oynni verið so lágt.

Í september búðu 4922 fólk í Suðuroy, og tað er ein minking upp á 28 fólk í mun til ársbyrjan.

Orsøkin til gongdina í fólkatalinum í Suðuroynni er fráflyting og negativt burðaravlop. Teir fyrstu níggju mánaðirnar í 2006 fluttu 22 fólk úr Suðuroynni og burðaravlopið var –1. Í 2005 var fluttu 67 fólk úr Suðuroynni og burðaravlopið var tá –10.

# FaroeJet flogið í eitt hálvt ár

14. mai setti flogfarið hjá FaroeJet seg fyri fyrstu ferð í Føroyum. Dagin eftir fleyg flogfarið fyrsta regluliga túrin úr Vágum til Danmarkar.

Nú mikudagin 15. november er eitt hálvt ár ligið, síðani Sólja, sum flogfarið rópast, fleyg fyrsta regluliga túr sín, og hetta tíðarskeiði hevur FaroeJet staðið fyri 200 túrum millum Føroya og Danmark, og flutt heili 15 túsund fólk.

Á heimasíðu sínari sigur felagið, at tey fegin vilja takka føroyingum og gestum teirra uttan í heimi fyri ta móttøku, tey hava fingið.

– Vónandi síggjast vit umborð á Sólju, ella hvør veit, kanska einari aðrari blómu, verður sagt á heimasíðuni, og harvið sigur felagið, at tey framvegis ætla at vaksa um flotan av flogførum.

# 14 ára gamal vestmenningur á rannsóknarferð

**Leygardagin skal Andrias Eriksen til Avstralia, har hann verður partur av manningini umborð á Vædderen og Galathea 3 rannsóknarferðini. Andrias, sum skal skriva frá túrinum og hjálpa granskarunum, gleðir seg ómetaliga nógv**

GALATHEA 3
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í morgun, mánamorgun, kl. 10, var boðið til tíðindafund í Norðurlandahúsinum.

Orsøkin var, at 14 ára gamli vestmenningurin, Andrias Eriksen, leygardagin fer av landinum við kós í móti Perth í Avstralia.

Í Perth liggur danska verjuskipið Vædderen, sum nú virkar sum rannsóknarskip á ferðini Galathea 3. Umborð eru granskarar, fjølmiðlafólk og skúlanæmingar, og tann 20. november verður skúlanæmingurin í áttanda flokki í Vestmanna skúla, partur av manningini.



*Andrias Eriksen og Hedvig Westerlund-Kapnas frá Norðurlandahúsinum eftir tíðindafundin í morgun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

– Eg eri sera spentur. Eg fái ikki sagt, at eg gleði meg til nakað ávíst, men nokk mest til allan túrin í síni heild, og at sleppa at uppliva heimin, sigur Andrias Eriksen.

### Er farin til verka

Umborð skal Andrias skriva weblog. Tað er eitt slag av eini dagbók frá túrinum, sum verður løgd út á alnetið, soleiðis at øll fáa fylgt við rannsóknarferðini. Aftrat tí, skal Andrias eisini hjálpa granskarunum við sínum arbeiði.

Tað er nokkso avmarkað hvat Andrias kann gera av fyrireikingum, men hann ger tað hann kann.

– Eg havi fylgt væl við, hvussu túrurin hevur gingið, og havi serliga lagt meg eftir at lesa, hvussu hinir næmingarnir hava greitt frá túrinum, soleiðis at eg veit hvussu eg skal gera, tá eg skal byrja, sigur Andrias, sum so smátt longu er farin til verka.

– Ja, faktiskt eri eg longu byrjaður at skriva frá tíðindafundinum í dag, og tað skal vera mín byrjan upp á mítt weblog, greiðir Andrias frá.

### Burtur í ein mánað

Andrias Eriksen fer sum sagt avstað leygardagin. 20. november mynstrar hann umborð á Vædderen í Perth, og 10. desember mynstrar hann av aftur. Hetta merkir, at hann er burtur frá skúlanum og floksfeløgunum í nærum ein mánað. Tá vit so spyrja hann, um hansara floksfelagar ikki eru øvundsjúkir, so flennir hann bara og sigur, at tað er ikki frítt.

– Jú, teir eru nokkso øvundsjúkir, men samstundis siga teir, at eg eri heppin og at tað er flott klárað av mær, so tað er bara skeg, smílist Andrias.

Hóast Andrias nú verður burtur frá vanligu undirvísingini og ikki fær fylgt við har, so kunnu næmingarnir og lærarar hansara kortini fylgja við hansara dagligdegi á alnetinum, og tað ætla teir eisini at gera, hava teir sagt við Andrias.

### Ikki ferðast nógv áður

Nú Andrias spakuliga skal byrja at pakka viðføri til ferðina tvørtur um knøttin, so spyrja vit hann, um hann hevur ferðast nógv áður.

– Nei, tað kann eg ikki siga. Eg havi bara verið her í Føroyum og Danmark. Eisini havi eg verið við ungdómslandsliðnum í Pólandi, og so havi eg spælt fótbólt í Skotlandi, men tað er so tað, sum eg havi verið uttanlands, sigur Andrias, sum nú av álvara sleppur at uppliva heimin, og á ein slíkan hátt, sum bert sera fáir av hansara javnaldrum hava upplivað hann.

# 200 kvinnur fingu hugskot og vegleiðing

**Hóskvøldið í farnu viku fingu 200 kvinnur góð ráð og hugskot um kost, hár, kropsburð, móta og mongum øðrum**

KVINNUKVØLD
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað var Sunda Róðrarfelag, sum skipaði fyri hesum tiltakinum í Eydnuni á Oyrarbakka, sum ógvuliga passandi hevði fingið heitið "Kvinnukvøld".

Salurin var stúgvandi fullur av kvinnum, og aftur við góðum mati vórðu tær fyltar við hugskotum um móta, stíl, kropsburð, hár, make-up og øðrum.

Mótaframsýningin var við lokala klædnahandlinum Brá. Lydia Petersen greiddi frá um stíl og litir. Fanny Kruse gav góð og einføld ráð um kropsburð, og Ulla S. Brandii ráðgav kvinnunum um kost.

Hetta riggaði alt stak væl, men áskoðararnir, sum higartil bara høvdu eygleitt tað, sum fyrifórst á pallinum, fingu nú høvi at verða partur av pallmyndini.

Elisabeth Johannesen og Vera Larsen gjørdu hvør í sínum lagið hár og make-up, og til ta uppgávuna skuldu tær brúka tvær kvinnur úr salinum.

Kvøldið endaði við einum sokallaðum make-over, har tvær kvinnur fingu gjørt hár, lagt make-up, fingu nýggj klæðir og tað sum har til hoyrir.

Samanumtikið var talan um eitt ómetaliga væleydnað kvøld fyri kvinnurnar í Sundalagnum. Flestar mundu tær fáa okkurt burtur úr tiltakinum, og tað fekk Sunda Róðrarfelag, sum skipaði fyri tiltakinum, uttan iva eisini.



*Vera Larsen ger hár á pallinum og Elisabeth Johannesen leggur make-up, meðan hon gevur góð ráð og hugskot*